


## Lønarumbønir

Í Lønargreiðsluni er **yvirlitið** við lønarumbønum broytt.

Tað verða alsamt mentar fleiri og fleiri lønarumbønir, og tí hava vit gjørt av at skipa tær øðrvísi og býta tær sundur í fleiri partar.

Yvirlitið hevur verið sum niðanfyri. Tann parturin, sum eitur **Vísingar** er óbroyttur




Lutfalsliga flestar umbønir eru í tí bólkinum, sum eitur **Skráset løn**. Tann bólkurin er fluttur ovast og hevur eisini fingið nýtt navn, **Útgjøld og frádráttir**.

Nýggja yvirlitið er soleiðis:




Bólkarnir **Nýtt starv**, **Barsil** og **Starvsheiti** eru óbroyttir.

Hinir eru allir broyttir, og broytingarnar eru lýstar niðanfyri.




## Útgjøld og frádráttir

Í gamla bólkinum **Skráset løn** vóru umbønirnar **Lønarútgjald** og **Samsýning**. Nú eru eisini umbønirnar **Keyp frí** og **Serstøk frívika útgjald** koyrdar í henda bólkin.




Inni í Lønargreiðsluni, ovast í gylta breddanum, hava vit savna fleiri vegleiðingar. Har eru eisini vegleiðingar um funkurnar **Keyp frí** og **Serstøk frívika útgjald**.

## Starvsbroytingar

Tann gamli bólkurin, sum æt **Broytingar**, er nú býttur sundur í tríggjar bólkar. Teir eita **Starvsbroytingar**, **Kontur og limagjald** og **Setanarbræv o.tíl.**

Í bólkinum **Starvsbroytingar** hava vit savnað tær umbønirnar, sum snúgva seg um at broyta starvið. Tað er at broyta lønarbrotið, lønarbýtið (sum er ein serlig funka til miðnámsskúlarnar), leingja starvið, enda starvið og at biðja um broytingar í Vaktætlan.




## Setanarbræv o.tíl.

Tað eru fleiri skriv, sum heilt ómakaleyst kunnu verða gjørd í Lønargreiðsluni. Til dømis ber til at gera setanarbrævið í eini handavend, tá ið nýtt starv verður stovnað. Tað kann henda, at okkurt starv er, sum setanarbræv ikki er gjørt fyri beinanvegin. Tá ber til at fara undir bólkin **Setanarbræv o.tíl.**, trýsta á **Setanarbræv** og gera setanarbrævið.




Ætlanin er, at í her skulu eisini vera ískoytisskriv til setanarbrævið. Ískoytisskrivini skulu verða brúkt, tá ið setanarbrotið verður broytt, ella tíðaravmarkað setan verður longd.




## Kontur og limagjald

Hetta er seinasti parturin av teimum umbønunum, sum vóru í tí gamla bólkinum **Broytingar**. Í hesum bólkinum ber til at broyta bankakontuna hjá starvsfólki.




Eisini eru tvær nýggjar umbønir gjørdar.

Onnur er, at tað ber til at biðja um, at eftirlønargrunnurin ella eftirlønarkontan hjá starvsfólkinum verður broytt.

Hin er, at tað ber til at senda boð um at gera broytingar í limagjaldinum hjá ávísum starvsfólki. Tað kann vera at biðja um, at limagjald verður goldið, strikað ella geva boð um, at limagjaldið verður goldið til annað felag. Váttan skal leggjast við, sum starvsfólkið hevur skrivað undir. Tann váttanin kann verða gjørd í skipanini.

Tað ber bara til at brúka limagjaldsumbønina fyri teir sáttmálar, har tað er ásett í sáttmála, at arbeiðsgevarin flytur limagjaldið.

## Annað

Rosinan í pylsuendanum er bólkurin **Annað**.




Hesin bólkurin skal einast brúkast til tað, sum ikki rúmast í øllum hinum umbønunum. Brúkið eisini hetta í staðin fyri at senda teldupostar um lønarbroytingar o.tíl.